## Seldu Grønland í Madrid

Tey, sum vitjaðu ferðavinnustevnuna FITUR í spanska høvuðsstaðnum Madrid í síðstu viku, fingu millum annað eitt vinarligt tilmæli um at fara til Grønlands at ferðast. FITUR er serliga ætlað teimum londum, ið hava spanskt sum høvuðsmál, og sambært grønlendska kringvarpinum høvdu spaniumenn stóran áhuga fyri Grønlandi sum ferðamáli. Í fjør vóru umleið 600 sponsk ferðafólk í Suðurgrønlandi, og talið hevur verið veksandi tey seinastu árini, sigur KNR. Grønlands Turist og Erhvervsråd stóð fyri tí grønlendska básinum í Madrid.



## Seldu nógv seyðakjøt

Tað lága virðið á íslendsku krónuni hevur gjørt, at útlendingar kunnu keypa bíligt seyðakjøt í Íslandi, og tað sást aftur á útflutningstølunum í fjør. Morgunblaðið skrivar, at íslendingar seldu 2.399 tons av seyðakjøti av landinum í fjør, og at tað var heili 60 prosent meiri enn í 2008. Tað mesta varð selt í grannalondunum og í USA, men nakað fór eisini til lond í Asia. Orsakað av tí lága krónuvirðinum fingu íslendingar fleiri krónur fyri seyðakjøtið í fjør. Tað sama var galdandi fyri øl, vatn og aðrar matvørur, sum fóru av landinum.

# Sjálvandi fara vit at krevja hægri løn

**- Eg kann ikki góðtaka, at politikarar krevja, at vit skulu vísa samfelagssinni og tálma lønarkrøvini, samstundis sum teir hótta við at hækka øll møgulig avgjøld, staðfestir formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag**



*- Eg ivist ikki í, at politikarar bara sita og bíða til vit hava gjørt nýggjan lønarsáttmála, so smekka teir til, sigur Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag*

SAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Sjálvandi fara vit at krevja lønarhækking í samráðingunum, sum verða nú.

Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag er púra greiður, tá ið vit spyrja hann, hvørjar vónir hann hevur til sáttmálasamráðingarnar, sum verða við arbeiðsgevararnar nú í næstu framtíð.

Sáttmálarnir millum arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevararnar ganga út á midnátt 30. apríl og tí skulu samráðingar verða millum partarnar nú í vár.

Og formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag er sannførdur um, at arbeiðarafeløgini eiga at fara eftir eini lønarhækking.

Hann er eisini leiddur og keddur av kravinum, sum javnan verða sett fakfeløgunum um, at tey skulu tálma lønarkrøvini fyri at vísa samfelagssinni.

- Tað er lítil meining í, at vit vísa samfelagssinni og tálma lønarkrøvini, samstundis sum politikararnir hótta við at hækka avgjøld av øllum handa slagi, sigur hann.

- Hjá mær er slíkt ómøguligt at góðtaka, leggur hann afturat.

### Hóttir við øktum avgjøldum

Formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag heldur, at hetta er ongantíð so aktuelt sum beint nú, eftir at sjálvur fíggjarmálaráðharrin, Jóannes Eidesgaard, fleiri ferðir hevur víst á, at tað er neyðugt at breiðka skattagrundarlagið, sum tað so fint eitur.

Seinast, hann gjørdi tað, var í Sosialinum í farnu viku, tá ið hann gjørdi greitt, at tað ber ikki til at spara hallið á fíggjarlógini burtur, tí so detta vælferðartænasturnar í samfelagnum sundur.

Tí er landsstýrismaðurin sannførdur um, at tað eisini verður alneyðugt hjá politiska myndugleikanum at hugsa um, hvussu landskassin kann fáa hægri inntøkur.

Í hesum sambandi heldur hann, at nøkur avgjøld, sum tað ber til at hækka, eru avgjaldini á olju og bensino og kanska onnur umhvørvisgjøld við.

Hetta eru avgjøld sum raka vanliga løntakaran beinleiðis og tí heldur Hans Joensen, at tað er ongantíð so týdningarmikið hjá fakfeløgunum at vera á varðhaldi sum akkurát nú.

- Tað verður ómetaliga tórført hjá mær at góðtaka, at vit skulu tálma lønarkrøvini og vísa samhaldsfesti, nú samfelagið er á gravarbakkanum, tá ið sjálvur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum longu frammanundan samráðingunum hóttir okkum við hægri avgjøldum.

- Tann stóri vandin er, at so títt og knapt vit hava skrivað undir ein nýggjan lønarsáttmála við lítlari ella ongari lønarhækking, verða alskyns avgjøld hækkað.

Formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag hevur so lítið álit á politisku skipanini, at hann ivast ikki í, at politikarar bíða við vilja til arbeiðarafeløgini hava skrivað undir nýggjan sáttmála, so smekka teir til við avgjaldshækkingum.

Hann leggur stóran dent á, at við hesum hevur hann ikki lagt upp til, at arbeiðarafeløgini skulu tálma lønarkrøvini, tí feløgini fara sjálvandi at krevja hægri løn.

Hann ivast heldur ikki í, at tað fer at kynda uppundir lønarkrøvini hjá fakfeløgunum, at politiski toppurin longu nú er farin at tosa um at hækka ymisk avgjøld.

- Tað sigur seg sjálvt, at tað fer at ávirka samráðingarnar og lønarkrøvini, leggur hann afturat.

# Mugu ikki sleppa at lumpa arbeiðsfólk einaferð afturat

**Fakfeløg og politikarar mugu seta seg niður at tosa um, hvussu lønarlagið skal vera næstu árini fyri at forða fyri, at lønirnar verða etnar upp av øktum avgjøldum, heldur Hans Joensen, formaður í Havnar arbeiðsmannafelag**

SAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Vit mugu tryggja okkum, at politikarar ikki einaferð afturat sleppa at lumpa fakfeløgini til at vísa samfelagssinni og til at tálma lønarkrøvini.

Tað heldur Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag, nú samráðingar skulu vera í vár millum arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevararnar

Hann hevur fleiri ferðir gjørt seg til talsmann fyri trýpartasamráðingum millum arbeiðarafeløgini, arbeiðsgevararnar og politiska myndugleikan um, hvussu lønarlagið skal vera næstu árini.

Endamálið við slíkum samráðingum er at avtala, hvussu lønarlagið skal verða næstu árini og at forða fyri at lønin verður etin upp av avgjaldshækkingum.

Tað, sum liggur í tí er, at skal talan vera um, at fakfeløgini skulu tálma lønarkrøvini fyri at vísa samfelagssinni, mugu tey fáa trygd frá politiska myndugleikanum fyri, at tey ikki fáa tað afturlønt við hægri avgjøldum.

Og hann heldur, at hetta er ongantíð so týdningarmikið sum nú, tá ið hugsað verður um, hvussu støðan er í samfelagnum.

Hinvegin er hann eisini greiðir yvir, at hetta er sum at vísa hundi brand, tí nógv fakfelagsfólk vilja ikki hoyra talan um politiska uppílegging í sáttmálasamráðingar.

Men Hans Joensen heldur, at tað nyttar lítið at biðja politiska myndugleikan halda fingrarnar vekk í sáttmálasamráðingum og so standa sum ryssa yvir deyðum fyli og onki gera, tá ið skattir og avgjøld verða hækkað.

- So eiga vit eisini at fara á barrikadurnar fyri at forða fyri, at politikararnir sleppa at hækka avgjøldini, sigur Hans Joensen.

- Tað er lítil meining í at samráðast um lønir, tá ið lønin verður etin upp við tað, at politikarar leggja avgjøld á okkum, akkurát sum teir hava hug, leggur hann afturat.

- Eg skilji væl, at løntakarar eru misnøgd um avgjaldshækkingar og tí mugu vit royna at binda fyri, so at vit sleppa undan avgjaldshækkingum og tí eiga vit at hava betri samband við politikararnir, sigur formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag.